14. apríl 2023

# Ogn í Skálavík til sølu.

Skálavíkar kommuna lýsir við hesum matr.nr. 53, Skálavík, til sølu.

Talan er um økið matr.nr.53 á Mølini í Skálavík, økið er 678 $m^2$ til víddar, og liggur í **A: Miðstaðarøki** í byggisamtyktini.

Tað er upp til tey, ið bjóða, at koma við hvat økið skal brúkast til, hvussu økið skal skipast og hvat slag av virksemi talan verður um á økinum, ið líkur krøvini í byggisamtyktini fyri økið.

Tá rætta loysnin er funnin verður gjørdur keypssáttmáli um ognina.

Fyri útboðið er kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn galdandi. Hetta merkir millum annað at Skálavíkar kommuna ikki hevur skyldu at taka av nøkrum boði.

Fyrispurningar viðvíkjandi ognini og sølutreytunum kunnu sendast til Skálavíkar kommunu, att. Linjohn Christiansen, borgarstjóra, Gerðisvegur 13, 220 Skálvavík, telefon: 225062, og teldupost: linjohn@skalavik.fo, staðseting av økinum sæst á skalavikar.kort.fo

Tilboð um keyp skulu vera skrivlig. Saman við boðnum skal sendast váttan frá peningastovni um, at tann ið bjóðar, hevur fígging tøka.

Freistin at lata inn boð er tann 1.Juni 2023 kl 12:00

Innkomin tilboð eru í trúnaði, til ognin er seld.

Skálavíkar kommuna
Linjohn Christiansen, borgarstjóri